## Nullhugsjónin góðtekur ikki manglandi vilja

Hóast talið á deyðum og løstaðum í ferðsluni er nakað minkað, samanbera vit við 10 ár aftur í tíðina, eru framvegis ov mong, sum gerast offur í okkara vegaflutningsskipan, sum øll noyðast at ferðast í.

Vegirnir og akførini gerast alsamt tryggari, gamaní, men mannakroppurin tolir framvegis ikki bráðstøðg við ferð yvir 70-80 km/t. Nýggir bilar hjálpa okkum ikki, tá vit eru gáloysin, og tað fara framvegis at ganga mong ár, áðrenn øll hava ein bil, sum tekur yvir, tá bilførarin svíkur. Tí noyðast vit framvegis at virka fyri at ávirka fólk í ferðsluni. Tað skal ikki kosta okkum lívið at gera gera mistøk; tí verða vegir bygdir við 'fyrigevandi' fyriskipanum so sum autoverjum, rumlistrípum og øðrum. Soleiðis tekur eigarin av vegnum sín part av ábyrgdini fyri nullhugsjónini. Har hetta ikki røkkur, noyðast vit at brúka sálarligu 'girðingina': Ein trygg vegaskipan krevur, at tey, sum brúka hana, fylgja ferðslureglunum. Nullhugsjónin góðtekur manglandi evnini hjá menniskjum í ferðsluni, men hon góðtekur ikki manglandi vilja.

Hugburðarkanningin av ferðsluni, sum Ráðið fyri Ferðslutrygd læt gera í desember 2015, vísir, at tað í týðandi málum í ferðsluni, skortar upp á vilja. Hetta sæst á útvaldum talvum á seinastu síðunum í hesi ársfrásøgn.

## Status nullhugsjón

Myndin vísir deyð í ferðsluni og tal á akførum. Í 2015 doyði ein í ferðsluni í Føroyum. Hetta er eitt lutfalsliga lágt tal, tó at ein og hvør deyður í ferðsluni er ein ov nógv. Hóast støðan eyðsýniliga er batnað síðan áttatiárini, liggja vit munandi aftanfyri grannalond okkara.







Kelda: Landsverk

Ár eftir ár síggja vit í Noregi, Svøríki og Danmark, at tey bróta síni egnu met í fáum deyðum í ferðsluni. Hjá teimum doyggja sløk 3 fyri hvørjar 100.000 íbúgvar. Okkara 10 ára miðal, sum kann lesast á ljósabláu prikklinjuni, liggur uppi á gott 6 fyri hvørji 100.000. Tað vil siga gott 3 um árið, tí vit eru 49.000 íbúgvar.

Skulu vit á teirra stig, mugu ikki fleiri enn 1,5 doyggja í ferðsluni um árið.

Í Europa tilsamans doyggja 9,3 fyri hvørjar 100.000

íbúgvar. Dømi um lond, sum Føroyar liggja á umleið sama stigi sum, eru: Italia (6,1*), Slovenia (6,4) og Kekkia (6,1). Dømi um europeisk lond, uttanfyri Norðurlond, sum hava færri deyð enn Føroyar eru: Frakland (5,1), Holland (3,4), Bretland (2,9)

**Ferðsluvanlukkur við fólkaskaða**
Men nullhugsjonin snýr seg eisini um tey, sum fáa álvarsligt mein í ferðsluni.

Reyða linjan vísir mál sambært ferðslutrygdarætlanini, sum var: "Talið á ferðsluóhappum við fólkaskaða skal vera 30% minni í 2015 enn í dag (2006)." Hetta er væl og virðiliga rokkið. Spyrjast kann tí, um málið var nóg ambitiøst.

Men her er ein dropi av galli í hesum hagtølum.

Ferðsluóhapp við fólkaskaða




Tølini vísa tøl á vanlukkum, har løgreglufólkið á staðnum metti, at onkur skuldi á skaðastovuna. Her verður ikki skilt ímillum smærri løstir og tey, sum verða 100% óarbeiðsfør. Samanumtikið er málið um 30 % færri ferðsluóhapp við fólkaskaða sostatt rokkið; og rákið er greitt, at talið á ferðsluóhappum við fólkaskaða minka. Men vit vita einki um, hvussu stórur partur av hesum eru álvarsliga skadd, ella í hvønn mun talið á álvarsliga skaddum er minkað hesi seinastu 10 árini.

Vit kunnu spyrja, um vit kunnu gera tað betri og nærkast gongdini í okkara grannalondum? Í Ráðnum fyri Ferðslutrygd halda vit, at tað kunnu vit. Men her kemur einki av sær sjálvum.

**Hvussu koma vit best víðari?**
Tá ið Ráðið fyri Ferðslutrygd hátíðarhelt 40 ára stovningardagin, vístu vit á hesi stig sum tey mest átrokandi. Her skal áherðsla leggjast á, at hesi trý ovaststandandi stigini eru **sjálvsagdar fortreytir** hjá øllum grannalondum okkara fyri arbeiðnum at skapa tryggar vanar í ferðsluni.

*1. Ferðslutrygdarætlanin dagførd*
Tað er umráðandi, at settur verður bólkur at dagføra ferðslutrygdarætlanina, sum gekk út í 2015. Tað eigur at vera øllum greitt, hvørji yvirskipað tiltøk, ið partarnir, ið varða av ferðslutrygdini, meta hava størst týdning. Tað er ikki nóg mikið, bara at siga, at eingin skal doyggja í ferðsluni – vit mugu eisini kunna svara upp á, *hvussu* vit vilja røkka málinum!

Viðkomandi partar at dagføra ferðslutrygdarætlanina eru: Landsverk, kommunuumboð, løgreglan, Akstovan og Ferðslutrygd. Landsstýrið er sjálvandi umboðað í stýrisbólki.

---

* ***WHO: Global Status Report on Road Safety 2015***

Tað er nýggj vitan og nýggjar royndir hjá grannalondum, sum eiga at verða greinaðar í mun til Føroyar, *til dømis* alkolás til dømdar rúsdrekkakoyrarar og sjálvvirkandi ferðeftirlit á vegi og í tunlum.

*2. Hagtøl skipað og nágreinað*
Hagtøl mugu verða skipað og raðfest hægri av viðkomandi pørtum: Løgreglu, sjúkrahúsum og Landsverki. Hesir partar eiga í nógv størri mun at framleiða, greina og samstarva um hagtøl.

*3. Skaðanevnd til álvarsligar vanlukkur*
Vit vita alt ov lítið um, hvørjar orsakir eru til ferðsluvanlukkur í Føroyum, og í hvønn mun tær koma fyri. Alt ov nógv vitan fer fyri skeyti, sum kundi givið okkum innlit í okkara støðu, og soleiðis møguleika at fyribyrgja øðrum vanlukkum.

*4. Fleiri kunningarátøk*
Kanningar vísa, at í umleið 90 % av deyðsvanlukkum í ferðsluni eru menniskanslig mistøk partur av orsøkini. Samstundis vísa hugburðarkanningar okkara, at mong hava fyri neyðini at verða mint á trygga atferð í ferðsluni.

*5. Endurskoðan av bótum*
Bøtur eiga javnan at verða endurskoðaðar. Vit meta, at millum annað nýtsla av fartelefon, sum í dag gevur bót á 500 kr eigur at verða endurskoðað. Eisini bøtur fyri ov nógva ferð eiga at verða dagførdar.

*6. Meiri løgreglueftirlit?*
Tað er væl og virðiliga skjalprógvað, at kanst tú vænta at møta løgregluni í ferðsluni, hevur tað ávirkan á, hvussu tú ber teg at í ferðsluni.

**Stór samfelagslig sparing at minka talið á álvarsligum ferðsluvanlukkum**
Í *Álitinum um Nullhugsjónina* vórðu roknaðar út hesar samfelagsligu útreiðslur av ferðsluni:

| Lyklatøl 1991-2000 | |
|---|---|
| 1 deyður í ferðsluni | 19 mió. kr. |
| 1 sera álvarsliga skaddur | 13 mió. kr. |
| 1 álvarsliga skaddur | 4 mió. kr. |
| | |
| Árliga í 1991-2000 | 193 mió. kr. |

Í Danmark er roknað út, at tað at talið á skaddum í ferðsluni minkaði við 11.000 frá 2007-2012. Hetta hevði við sær eina samfelagsliga sparing á 31 mia. kr. Tað vil siga 31/6=5,2 mia. kr. um árið. Hetta byggir á tøl frá Donsku Ferðslutrygdarkommissiónini. Upphæddin svarar til umleið 50 mió. kr. um árið í mun til føroyska íbúgvatalið, um vit megnaðu tilsvarandi minking í tali á skaddum í ferðsluni.

Í hesum ljósi er greitt, at tað er risastór fíggjarlig sparing av at byrgja fyri ferðsluvanlukkum. At tað hevði loyst seg at sett meiri enn ta einu milliónina á fíggjarlógini til Ráðið fyri Ferðslutrygd til at betra vanarnar hjá føroyingum í ferðsluni. Inntøkur Ráðsins er harumframt limagjald frá kommunum og øðrum. Limagjaldið hjá kommunum til er Ferðslutrygd 3 kr. fyri

hvønn borgara. Íroknað onnur limagjøld gevur hetta eina samlaða árliga inntøku hjá Ferðslutrygd á umleið 1.191.000 til allan rakstur og virksemi.

Tryggingarfeløgini bæði, Trygd og Tryggingarfelagið Føroyar, stuðla umframt hetta ymsum átøkum, sum eru umrødd aðrastaðni í hesi ársfrágreiðing.

## Virksemi í 2015

**rff.fo í nýggjum hami**

1. juli fingu vit nýggja heimasíðu. Katrin Didriksen Apol, sum sjálv onnur stóð fyri at samskipa og framleiða nýggja undirvísingartilfarið til fólkaskúlan herfyri, hevur skrivað og samskipað nýggju heimasíðuna. Her eru at kalla allar neyðugar upplýsingar um skilagóða atferð í ferðsluni tøkar.



**Ov nógv ferð drepur**

Við tveimum filmum vildu vit saman við Tryggingarfelagnum Føroyum hava føroyingar at halda hámarksferðina. Í filminum, *Summir menn koma ov tíðliga – aðrir koma ordiliga*, síggja vit ungan mann í flottum bili. Ein dreymamaður. Bæði hann og bilurin hava alla røttu útgerðina. Hann freistast tó ikki at trýsta ov hart á spitaran. Fram við honum fer ein bilur fyri og annar eftir við vøkrum gentum, sum hyggja langtandi eftir hinum hóvliga. Endin er kanska óvæntaður: Í eygunum á gentunum er tann hóvligi hetjan fram um teir, sum koyra ov skjótt.



Filmurin, sum er ætlaður 18-24 ára gomlum ungum, var at síggja á internetinum og í biografum. Hann er vístur góðar 24.000 ferðir á youtube og 18.000 ferðir á facebook.

Í seinna filminun, *Tann dagin, eg hevði skund,* vendu vit okkum til bilførarar 25 ár og eldri. Her síggja vit mann, sum hevur fingið varandi mein. Honum tørvar hjálp til mangt í gerandisdegnum. Eisini misti hann tað besta, hann átti, í ferðsluvanlukkuni. Filmurin fer ógvuliga tætt upp á mannin; helst tættari enn vit eru von við. Í filminum venda vit okkum til kenslurnar hjá fólki, og vísa heilt ítøkilig dømi um, hvussu lívið kann kollveltast, um tú bara koyrir eitt sindur ov skjótt. 10 km/t kann vera munurin millum lív og



deyða. Vinningurin við at koyra ov skjótt er sjáldan meir enn nøkur fá sekund, og hetta stendur als ikki í mát við økta váðan, ið ein útsetir seg sjálvan og onnur fyri.

Filmurin var at síggja í sjónvarpinum hjá KVF og á internetinum. Hann hevur verið vístur á youtube útvið 5000 ferðir og á facebook útvið 14.000 ferðir. Fyri henda filmin vunnu RFF og Tryggingarfelagið Føroyar heiðurin, *Ársins Dynamiska lýsing*.

**Trygg íbinding av børnum**

Aftur í ár høvdu vit átakið, *Øksl, mjadnar, stramma væl*, saman við Trygd. Endamálið er at minna vaksin á at binda børnini rætt í trygdarbeltið í bilinum. Tá børn eru umleið 4 ár, fara




tey úr barnastólinum og á bilpútu við stólabaki. Hesin skal, sambært ferðslulógini, brúkast, til tey eru í minsta lagi 135 cm. Tá eru mong umleið 10 ára gomul.

Norðurlendskar kanningar vísa, at millum 1/3 og helvtin av børnum í bili ikki sita rætt íbundin. Antin tí bilstólurin ella bilpútan ikki eru sett rætt í, ella tí foreldur ikki eru nóg hyggin at binda barnið rætt í. Kanningarnar vísa eisini, at vanligastu feilirnir eru, at trygdarbeltið liggur skeivt, tað vil siga undir armin, afturum bak ella á yvirarminum - ella at trygdarbeltið situr leyst. Harumframt at barnið situr í trygdarbelti, men uttan bilpútu.

**Vinir lova framvegis ikki vinum at koyra skít**

Eins og undanfarin ár vóru rúsdrekkaátøk í juli og desember, sum eru háárstíðir fyri rúsdrekkakoyring. Tað er hesar mánaðirnar, at vit í størstan mun hugna okkum við vinum, eins og tað eru lutfalsliga mong tiltøk. Átakið hevur nú í fýra ár verið undir rakstrarrópinum, *Vinir lova ikki vinum at koyra skít*, og varhugin er, at tað er vorðið rættiliga kent millum manna. Ráðið arbeiðir við rúsrekkaátaki við nýggjum innihaldi til summarið 2016, sum tó verður treytað av, at vit finna privatar stuðlar






**Kommuna tók undir við átakinum um rúsdrekka**
Vága kommuna vendi sær til Ferðslutrygd í heyst, tí tey fegin vildu gerast partur av átøkum okkara, fyri at vera við til at betra um ferðslutrygdina í Vágum. Slagmátturin gerst, sum vera man, sterkari um átøkini hjá RFF eru sjónlig kring landið samstundis. Arbeitt varð við ætlanum um plakatir til lyktasteyrar, men hetta varð slept, fyri í staðin at gera royndarverkætlan í ljósu tíðini, tá skeltini síggjast. Í staðin framleiddu vit plakatir í A3-stødd, sum kundu verða prentaðar og hongdar upp. Vága kommuna hongdi plakatir upp á kommunuskrivstovuni og ymsastaðni í handlum, frisørsalongum og aðrastaðni. Soleiðis gjørdist átakið sjónligari í Vágum.





**Fótbóltsleikarar í trygdarbeltum**
Í nakrar vikur spældu fótbóltsleikarar í fýra liðum í Effodeildini og eitt kvinnulið í 1. deild í troyggjum við trydarbelti á. Talan var um HB, AB, FC Suðuroy, ÍF og KÍ 1. deild kvinnur.



Endamálið var at varpa ljós á týdningin av trygdarbeltum undir heitinum, 'Ferðsla er ikki eitt spæl – nýt altíð trygdarbelti'.
Tá tað gongur galið bilvanlukku, ert tú í ørmunum á trygdarbeltinum. Hetta hava flestallir føroyingar ásannað. Tí brúkar stórur partur av okkum trygdarbelti. Tann lítli parturin, sum framvegis koyrir uttan trygdarbelti, er týðiliga yvirumboðaður í deyðsvanlukkum. Átakið var samstarv millum Tryggingarfelagið Føroyar, Fótbóltssamband Føroya og Ráðið fyri Ferðslutrygd. Umframt at átakið var sjónligt á fótbóltsvøllum, var tað sjónligt í sosialum miðlum.

**Fólkafundur í Ítróttarhøllini á Hálsi**
Vit vóru á fólkafundinum í Høllini á Hálsi, har vit hittu føroyingar fyri at umrøða ferðslutrygd. Eisini vístu vit átaksfilmar, høvdu spurnakapping, vístu hjálmar, bjóðaðu heimagjørdan rúsdrekkafrían rabarbudrykk, meðan vitjandi kundu royna rúsdrekkabrillur og kenna máttin í trygdarbeltinum í Hvølvusi.






**RFF og Tryggingarfelagið Føroyar vunnu heiðurin, *Ársins dynamiska lýsing***
Triðja árið á rað valdi føroyski brúkarin lýsing hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd og Tryggingarfelagnum Føroyum í felag millum ársins bestu. Hesa ferð vunnu vit fyri sjónvarpslýsingina, "Hin dagin, eg hevði skund".



Uppmerksemið, sum hesin filmurin hevur fingið millum manna, var serstakt. Mong hava sagt frá, hvussu hesin filmurin fór undir húðina á teimum. Onkur stjóri hevur nevnt – eitt sindur í skemti - at hann nærum føldi seg illa, at ein gallupkanning hevði avdúkað, at hann koyrdi ov skjótt, samstundis, sum átakið var. Hetta tí gallupkanningin vísti, at fólk við hægst inntøkum í størstan mun koyrdu ov skjótt.

## Afturvendandi átøk

**Ferðsludagar fyri 8. floksnæmingum og næmingum í tekniskum skúlum**
Ferðsludagarnir vórðu hildnir fyri landsins 8. flokkum eins og undanfarin ár – samskipaðir av Ferðslutrygd og stuðlaðir av Trygd og Tryggingarfelagnum Føroyum.

Á degnum verða næmingarnir kunnaðir á ymsan hátt um trygga atferð í ferðsluni:

1. Við faktuellum upplýsingum
2. Persónligum samskifti, har næmingarnir verða tiknir upp í
3. Frásøgn hjá avvarðandi, sum hevur mist í ferðsluni

Heldur enn at bjóða næmingum í tekniska skúla í Perluna, høvdu vit sett upp nýggja, stytta skrá. Hesir dagar vórðu hildnir í teknisku skúlunum í Klaksvík og í Havn. Hvølvus og Gøllur vóru við. Hetta vísti seg at rigga stak væl.

Endamálið við ferðsludøgunum er:
• At næmingarnir skilja avleiðingar og váða
• At tey taka ábyrgd og duga at siga frá
• At tey verða eggjað til at taka trygg val í ferðsluni
• At tey hugsa um ferðslu






**1-1-2 dagar**
RFF tók lut á árliga 1-1-2-degnum, har løgreglan, brandstøðin, sjúkraflutningstænastan og Ferðslutrygd møta elstu barnagarðsbørnunum í Tórshavnar kommunu. Í ár vóru vit eisini við á 1-1-2-degnum í Leirvík.





**Súkkluhjálmar til 1. floksnæmingar**
Sum helst tey einastu í heiminum fáa øll børn í Føroyum, sum fara í 1. flokk, hvør sín hjálm til gávus í samstarvi millum Trygd og Tryggingarfelagið Føroyar. Her eru tað børn í Velbastaðar skúla.




**Endurskinsvestar**



Í samstarvi við Tryggingarfelagið Føroyar hevur Ráðið í mong ár latið øllum 1. floksnæmingum endurskinsvestar. Her næmingar í Kvívíkar skúla.

**Verndareinglar vísa veg**
Við átakinum við einglaveingjum, sum býta út ókeypis endurskin, hava RFF og Tryggingarfelagið Føroyar nú í fýra ár varpað ljós á endurskin. Fólk lána veingirnar og fáa endurskin at býta út í sambandi við átøk í desember.





## Virksemi 2016

Ferðslutrygd helt 40 ára stovningardag sín 19. januar 2016.

Átøk, sum arbeitt verður við:

- Ferð og verndareinglar saman við Tryggingarfelagnum Føroyar
- Átak saman við Trygd
- Ætlandi fara vit at venda okkum til fyritøkur um ferðslutrygga atferð
- Átøk um rúsdrekka, gáloysni og endurskin. Tó treytað av at nýggir privatir stuðlar verða funnir
- Harumframt føst árlig átøk.

## Umfatandi gallupkanning

Í desember 2015 læt Ferðslutrygd gera stóra kanning av hugburði føroyinga til atferð í ferðsluni. Vit lata her nakrar útvaldar talvur tala fyri seg:




Talvan vísir, at føroyingar serliga meta rúsdrekkakoyring at vera vandamikla í ferðsluni – 93 % meta hetta hava sera stóran ella stóran týdning fyri talið á álvarsligum ferðsluvanlukkum. Á 2. plássi liggur manglandi trygdarbelti. Munandi partur av føroyingum er eisini greiður um vandan við ov nógvari ferð, gáloysni og møði í ferðsluni.




Tó at fólk eru greið um at vandin av at koyra ov skjótt, siga bert 39 % seg vanliga halda hámarksferðina á landsvegi.




30 % av føroyingum halda meira politieftirlit vera besta háttin at fáa tey at halda hámarksferðina. Hetta hevur verið víst á sum besti hátturin øll árini, ið spurningurin hevur verið settur. Tó eru útvið líka mong, sum halda, at hægri bót ella sjálvvirkandi ferðeftirlit er besti hátturin.

Bøtur fyri brot á hámarksferð er lægri í Føroyum enn í grannalondum okkara.




Ár um ár siga 94-96 % seg ongantíð koyra við ov høgari promillu. Hetta er greið ábending um, at rúsdrekkakoyring als ikki er sosialt góðtikin millum manna. At kalla eingin vil kennast við seg sjálva/n sum rúsrekkakoyrara, sum vísir broyttan hugburð hesum viðvíkjandi.

Kortini gongur rúsdrekkakoyring framvegis aftur sum ein hin størsti syndarin í álvarsligum ferðsluvanlukkum.




Stórur partur av føroyingum eru tilvitaðir um sína skyldu, um tey varnast onnur, sum ætla at koyra við ov høgari promillu.
Hetta er at fegnast um, tí norðurlendskar kanningar vísa, at stórur partur av teimum sum koyra rúsdrekkakoyring, sat saman við ørðum, áðrenn farið varð at koyra.

Tað er ásett í ferðslulógini, at tú hevur ikki loyvi at sleppa persóni, sum av rúsdrekka ikki eru førur fyri á tryggan hátt, at koyra akfar.




Gáloysni er eitt lutfalsliga nýtt evni at gera ferðsluátøk um. Tó at nýtsla av handhildnari fartelefon við róðrið tíðum sæst í gøtumyndini, vísur talvan, at parturin, sum sigur, at tey ongantíð gera hetta, er spakuliga vaksandi.

Tó eru framvegis 37 %, sum siga seg javnan tosa í handhildna telefon.

Fartelefonir kunnu í dag verða brúktar til alskyns virksemi, sum hevur við sær, at bilførarar brúka tær meir við róðrið.




At tosa í handhildna fartelefon er vandamikið í ferðsluni. Men at brúka telefonina at lesa/senda sms/t-post er munandi vandameiri, tí her eru eyguni av vegnum. Ferðslustøðan kann broytast nógv upp á bert 4 sekund, meðan førarin hyggur burt av vegnum.

Talvan vísir greitt, at ung í mestan mun siga seg brúka handhildna fartelefon at lesa/senda sms/t-post. Sama myndin sæst uttanlands.




Í dag er revsingin fyri at brúka handhildna fartelefon við róðrið 500 kr.

Her kundu tey spurdu vísa á fleiri møguleikar. Talvan vísur, at stórur partur av føroyingum halda, at herd revsing hevði fingið tey at latið fartelefonina liggja, meðan tey koyra bil: 45 % mæla til klipp í koyrikortið og 41 % til hækking av verandi bót úr 500 upp í 2000 kr. Líka mong, 41 %, mæla til fleiri upplýsingarátøk. Næstan líka mong, 38 %, vísa á meira politi á vegunum.




Ráðið hevur í longri tíð arbeitt við ætlanum um átøk til fyritøkur. Norsk gransking vísir, at 40 % av deyðsvanlukkum hava arbeiðsakfar sum part av vanlukkuni, ella at vanlukkan hendir á veg til/frá arbeiði.

Talvan vísir, at mong javnan síggja vinnubilar (privatar og almennar) koyra ov skjótt. Tilsamans 48 % eru vitni til hetta dagliga ella fleiri ferðir um vikuna.

**Sum land mugu vit góðtaka at gera íløgur í betri vanar í ferðsluni!**
Ein trygg vegaskipan krevur, at tey, sum brúka hana, fylgja ferðslureglunum. Hugsjónin – nullhugsjónin – viðurkennir menniskjansligar feilir ella manglandi evnini hjá fólki í ferðsluni, men hon góðtekur ikki manglandi vilja.

Hesin viljin má ávirkast gjøgnum ferðslutrygdararbeiðið. Hetta eru tiltøk, sum skulu eggja okkum til at velja tær tryggu loysnirnar og ta snildu atferðina, so vit koma óskalað heim, sama um vit ganga, súkkla, koyra bil, motorsúkklu, prutl ella taka bussin.

At ávirka atferðina hjá fólki í ferðsluni krevur tilfeingi. Tiltøkini mugu byggja á fakligan kunnleika um, hvussu vit broyta vanar. Hetta krevur eitt skipað arbeiði við at ávirka atferðina hjá fólki. Hetta arbeiðið er so týdningarmikið, at vit sum land mugu finna okkum í at brúka tilfeingi upp á tað.

Her bíða stórar uppgávur, millum annað:

- Í Føroyum doyggja í miðal umleið tvífalt so nógv í ferðsluni sum í Noregi, Svøríki og Danmark í mun til fólkatalið
- 60 % av bilførarum siga seg vanliga bróta hámarksferðina á landsvegi
- 37 % siga seg javnan tosa í handhildna fartelefon
- Mett verður, at umleið 2. hvør sum eru deyður síðan 1986, og sum ikki var íbundin, hevði verið á lívi, um hann var í trygdarbelti.

Ikki bara fyri offrini fyri ferðsluni og teirra kæru loysir seg at fyribyrgja vanlukkum. Tað loysir seg eisini fyri samfelagskostnaðin. Við størri íløgu í at betra ferðsluvanarnar hjá føroyingum, kundu vit spart stórar útreiðslur – bæði peningaliga og menniskjansliga. Við nullhugsjónini sum stavnhaldi og sum §1 í ferðslulógini noyðast vit at gera meiri at minka um vanlukkurnar. Tað sømir seg ikki ár eftir ár at góðtaka, at her doyggja dupult so nógv sum í Danmark, Noregi og Svøríki, at vit rætt og slætt ikki vita hví, og onga yvirskipaða ætlan at hava fyri, hvussu vit venda hesi álvarsligu stillstøðu.

Uppskotið um játtanarkarmar fyri 2017 gretta ikki orð um at loysa hesar uppgávur. Hetta ger okkum ógvuliga stúrin. Vit vænta, at tað kortini fer at vísa seg, at politikarar fara at vísa í verki, at teir vilja seta í brennidepilin ávirkan á allar aldursbólkar í ferðsluni fyri at lyfta ferðslutrygdina upp á sama stig sum tey, ið vit helst vilja samanbera okkum við.

*5. apríl 2016*
*Ráðið fyri Ferðslutrygd*